Atli sá reytt

Tað hilnaðist einki serligt hjá Atla Danielsen og Frem, sum seinnapartin í gjár vitjaðu í Thisted. Úrslitið varð 2-2, eftir at Frem tvær ferðir hevði verið á odda. Tvífaldur málskjútti hjá Frem var Jesper Håkansson, sum fyri stuttum er komin úr FC Amager, ið er farið á heysin. Jón Rói Jacobsen var orsaka av skaða ikki í Frem miðverjuni. Hjá Atla Danielsen, ið - sum altíð - var á sentrala miðvøllinum, gekk tað ikki heilt eftir vild. Tá ið tíggju minuttir vóru eftir, varð Atli rikin av vølli, og tá ið tað restaðu tveir minuttir javnaði heimaliðið við brotssparki.

AB vann uttan Christian Høgna

AB spældi leygardagin ímóti Kolding í Gladsaxe. Føroyski landsliðsspælarin, Christian Høgni Jacobsen var slettis ikki við í hópinum hjá AB. AB vann dystin 2-1, aftaná hálvleiksstøðuna 2-0. Poul Hübertz legði AB á odda í 16. minutti. Stutt undan steðginum økti Simon Bræmer til 2-0. Í seinna hálvleiki minkaði Jesper Christiansen um munin til 2-1, sum gjørdist endaliga úrslitið av dystinum. Stutt undan leikloki fekk Poul Hübertz reyða kortið. AB er nummar fýra í næstbestu donsku fótbóltsdeildini við 37 stigum fyri 20 dystir. Komandi dystur hjá AB er á útivølli ímóti Skive.

Tim Howard gjørdist stóra hetjan, tá hann bjargaði brotsspørkum frá bæði Dimitar Berbatov og Rio Ferdinand

Mynd: Polfoto/AP

Chelsea og Everton í FA Cup finaluni

Arsenal og Manchester United máttu lúta í hálvfinalunum

FÓTBÓLTUR

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

Tað vera Chelsea og Everton sum møtast í heimsins elstu fótbóltskapping, FA Cup kappingini, sum var spæld á fyrsta sinni í 1872.

Leygardagin spældu Chelsea og Arsenal hálvfinalu á Wembley. Dysturin var bara 18 minuttir gamal, tá vinstra bakkurin hjá Arsenal, Gibbs legði bóltin inn í Chelsea-brotsteigin. Bólturin endaði hjá Theo Walcott, sum skeyt eitt skot við vinstra beini, sum Ashley Cole avrættaði í málið. Chelsea javnaði 14 minuttir seinni. Frank Lampard sendi ein bólt inn til fraklendingin, Florent Malouda, sum tók bóltin niður og plasseraði hann framvið málverjanum hjá Arsenal.

Sjey minuttir undan leikloki skoraði Didier Drogba sigursmálið hjá Chelsea. Didier Drogba fór framvið Arsenal-verjuspælarunum, og síðani eisini málverjanum hjá Arsenal, Fabianski, og skoraði trygt til endaliga úrslitið 2-1 til Chelsea.

Enn eitt mál av fílabeinstrandinginum, sum hevur verið væl fyri, síðani Guus Hiddink gjørdist venjari hjá Chelsea. Arsenal-venjarin, Arsene Wenger var alt annað enn nøgdur við dystin.

– Vit lata tvey løtt mál fara inn. Tað var vánaligt verjuspæl báðu ferðirnar, segði Arsene Wenger til BBC aftaná dystin.

Enn einaferð Everton

Eins og í finaluni í 1995, eydnaðist tað Everton at koppa Manchester United. Manchester United byrjaði annars dystin við fýra blaðungum spælarum, men hesir kláraðu tað væl. Frederico Macheda, Darren Gibson, Danny Welbeck, Rafael og Fabio spæla vanliga á eykaliðnum hjá Manchester United.

Serliga Darren Gibson stóð sterkur í myndini á miðvøllinum. Bæði liðini høvdu góðar málmøguleikar, men tá 90 minuttir vóru farnir stóð á jøvnum 0-0. Neyðugt var við longdari spælitíð, men eisini har endaði málleyst. Neyðugt var at fara til brotssparkskapping, sum Everton vann 4-2.

Tim Cahill brendi fyri Everton, meðan Dimitar Berbatov og Rio Ferdinand brendu fyri Manchester United. Serliga brotssparkið hjá Berbatov var út av lagið vánaligt. Bulgarin tók onga ferð, og skeyt brotssparkið, sum var tað ein vánalig sending.

– Hetta er tað ringasta brotssparkið eg nakrantíð havi sæð av einum altjóða spælara, segði fyrrverandi Everton-venjarin, Joe Royle við SkySports.

Tim Howard í Everton-málinum hevur eina fortíð í júst Manchester United, og Everton-venjarin, David Moyes rósti Howard fyri sítt málmansspæl. Phil Jagielka skeyt avgerandi brotssparkið, og millum hinar sum skoraðu fyri Everton var fyrrverandi Manchester United spælarin, Phil Neville.

Finalan í FA Cup kappingini verður spæld leygardagin tann 30. mai á Wembley Leikvøllinum í London.

Úrslit, Premier League

Leygardagin	
Aston Villa-West Ham	1-1
Middlesbrough-Fulham	0-0
Portsmouth-Bolton	1-0
Soke-Blackburn	1-0
Sunderland-Hull	1-0
Sunnudagin	
Tottenham-Newcastle	1-0
Manchester C-West Brom	4-2
Týsdagin	
Liverpool-Arsenal	
Mikudagin	
Manchester Utd-Portsmouth	
Chelsea-Everton	

Wolverhampton aftur í Premier League

Aftaná seks kappingarár verður hevur liðið úr Midlands aftur vunnið seg upp í bestu fótbóltsdeildina

FÓTBÓLTUR

Heri Simonson
heris@sosialurin.fo

Gamla stórfelagið, Wolverhampton verður nú aftur at vinna í Premier League. Felagið úr Midlands tryggjaði særuppflytingina leygardagin við einum 1-0 heimasigri á Queens Park Rangers. Sigursmálið skeyt Sylvan Ebanks-Blake, tá ein minuttur var farin av seinna hálvleiki.

Wolverhampton flutti niður úr Premier League í 2003, aftaná bert eitt kappingarár í bestu deildini. Tá uppflytingin gjørdist veruleiki leygardagin, runnu fleiri ovurfegin viðhaldsfólk út á vøllin.

Sheffield United, sum liggur á triðja plássi, kann nú ikki røkka Wolverhampton, men teir liggja fýra stig aftanfyri Birmingham City, sum liggur næstovast í næstbestu ensku fótbóltsdeildini.

Lítil vón fyri West Bromwich

Birmingham-liðið er nú 10 stig frá bjarging, og liðið hevur bert fimm dystir eftir at spæla

FÓTBÓLTUR

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

West Bromwich var á vitjan á City of Manchester Leikvøllinum ígjár, og var tað pískandi neyðugt, at West Bromwich fekk øll stigini. Men tað hilnaðist als ikki, og endaliga úrslitið var, at West Bromwich tapti 4-2. Hálvleiksstøðan var 2-1, og West Bromwich megnaði at javna til 2-2, men tað rakk ikki, tá saman um kom.

Tað byrjar eisini at síggja sera svart út hjá Newcastle, sum tapti 1-0 ímóti Tottenham á útivølli. Middlesbrough fekk javnleik 0-0 á heimavølli ímóti Fulham, men tað flutti ikki liðið nógv í niðurflytingarstríðnum.

Stoke vann ein sera týdningarmiklan 1-0 sigur á Blackburn, og Sunderland vann ein sera týdningarmiklan 1-0 sigur á Hull.

Í hinum endanum eydnaðist tað heldur ikki Aston Villa at vinna hesaferð. Aston Villa fekk bert javnleik 1-1 á heimavølli ímóti West Ham, og má Villa sanna, at tað verður ringt at hála inn á fjórða plássið hjá Arsenal, sum gevur rætt til at spæla í Champions League.